# Tænastuhondbók

# fyri

# AA í Føroyum

# 2024/25

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ............ 3

Luttakarar á Tænasturáðstevnuni ............ 4

Bólkaumboðsfundir ............ 4

Skrá fyri Tænasturáðstevnuna ............ 5

Støðutakan hjá Tænasturáðstevnuni ............ 6

Tænasturáðið, undirnevndir og tænastubólkar ............ 6

Valbæri til Tænasturáðið ............ 8

Fíggjarviðurskifti ............ 8

Endi ............ 8

Inngangsorð til AA-fundir ............ 9

Tey 12 Stigini ............ 10

Teir 12 Siðirnir ............ 11

Tey 12 hugtøkini fyri Tænastu ............ 13

Lyftini ............ 15

Hvat er ein AA bólkur ............ 16

# Inngangur

Fyrsta Tænastuhondbókin fyri AA í Føroyum varð samtykt á Tænastu-ráðstevnuni, sum varð hildin í Losjuni í Tórshavn, tann 17. apríl 2010.

Tænastuhondbókin verður á hvørjum ári góðkend við møguligum broytingum av Tænasturáðstevnuni, sum er hægsti myndugleiki fyri AA í Føroyum.

Tænastuhondbókin 2024/25 varð góðkend á Tænasturáðstevnuni, sum varð hildin í Missiónshúsinum í Vestmanna, tann 20. apríl 2024.

# Tænasturáðstevnan í Føroyum

Tænasturáðstevnan skal umrøða felags áhugamál innan AA-felagsskapin í Føroyum. Karmurin fyri virksemið hjá Tænasturáðstevnuni eru tey 12 hugtøkini fyri alheims tænastu, sum eru galdandi fyri AA-felagsskapin.

Endamálið við Tænasturáðstevnuni er at samskipa arbeiðið innan AA-felagsskapin í Føroyum, við tí endamáli at bera boðskapin til alkoholikaran, sum enn pínist.

Tænasturáðstevnan verður hildin eina ferð um árið. Tænasturáðstevnan ger av hvar næsta Tænasturáðstevna skal haldast.

Eykatænasturáðstevna verður hildin, um ein meiriluti í Tænasturáðnum ynskir hetta, ella um 4 AA-bólkar seta fram ynski um hetta, til viðgerðar av einum evni, sum verður at tilskila.

# Luttakarar á Tænasturáðstevnuni

Allir AA-bólkar í Føroyum kunnu velja sær eitt umboð, sum hevur atkvøðurætt til Tænasturáðstevnuna.

Allir AA-limir kunnu møta á Tænasturáðstevnuni, tó uttan atkvøðurætt.

AA-limir úr øðrum londum kunnu luttaka uttan atkvøðurætt.

# Bólkaumboðsfundir

Minst ein bólkaumboðsfundur eigur at vera millum árligu tænasturáðstevnurnar, hann skal vera í oktober mánaði.

Bólkaumboðsfundir eru ætlaðir til at geva betur høvi hjá AA- bólkunum í Føroyum at viðgera ymist í sambandi við AA í Føroyum. Bólkaumboðsfundir kunnu eisini brúkast til at fyrireika mál til Tænasturáðstevnuna.

Ongar avgerðir kunnu takast á bólkaumboðsfundum.

# Skrá fyri Tænasturáðstevnuna

Tænasturáðstevnan skal verða hildin á hvørjum ári í apríl mánaði.

Áðrenn Tænasturáðstevnan byrjar, verða møttu bólkarnir skrásettir og hvør einstakur bólkur fær eitt atkvøðukort.

Dagsskráin fyri ráðstevnuna er hendan:

1) Val av fundarstjóra og skrivara
2) Frágreiðing um virksemið hjá Tænasturáðnum og møguligum undirnevndum hjá Tænasturáðnum
3) Framløga av roknskapi
4) Umrøða av uppgávum, sum Tænasturáðið skal taka sær av
5) Val av Tænasturáði og 2 varalimum til ráðið
6) Val av grannskoðarum
7) Góðkenning av 2 „ikki Alkoholikarum" til Tænasturáðið
8) Ásetan av tíð og stað fyri næstu Tænasturáðstevnu
9) Góðkenning av Tænastuhondbókini
10) Mál sum Tænasturáðið ella limir hava sett á dagsskrá
11) Ymiskt

Tænasturáðið sendir skriv til limirnar við áminning um tíð og stað í minsta lagi 12 vikur áðrenn Tænasturáðstevnuna. Í skrivinum verður upplýst hvørji evni eru til viðgerðar á ráðstevnuni.

Tænasturáðstevnan kann bert viðgera mál, sum standa á dagskránni fyri Tænasturáðstevnuna.

Bólkar og limir kunnu senda mál inn til viðgerðar á Tænasturáðstevnuni. Øll innkomin mál eiga at hava verið viðgjørd í einum AA-bólki ella á einum bólkaumboðsfundi. Tænasturáðið kann vísa mál frá sær, sum ikki eru í tráð við siðirnar og mál, sum einki hava við AA at gera. Mál, sum verða avvíst, skulu sendast aftur til uppskotsstillara við grundgeving fyri hesum.

# Støðutakan hjá Tænasturáðstevnuni

Øll mál á Tænasturáðstevnuni verða avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið.

Atkvøðugreiðsla fer vanliga fram við at rætta atkvøðukortið upp. Val av Tænasturáðið, undirnevndum og arbeiðsbólkum fer fram skrivliga.

Til at samtykkja broytingar í hesum viðtøkum krevst tó, at uppskotið verður samtykt av 2/3 av samlaða atkvøðutalinum sum eru á Tænasturáðstevnuni.

# Tænasturáðið, undirnevndir og tænastubólkar

Tænasturáðstevnan velur eitt Tænasturáð.

Tænasturáðið hevur evstu ábyrgdina av, at tær samtyktir, sum Tænasturáðstevnan hevur gjørt, verða framdar.

Tænasturáðið skal hava 5 ráðslimir og 2 varalimir valdir av Tænasturáðstevnuni. Ráðslimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn og kunnu veljast aftur. Ein ráðslimur kann í mesta lagi sita trý valskeið.

Tænasturáðið eigur at verða sett saman á henda hátt:

1 limur umboðar Norðoyggjar

1 limur umboðar Eysturoy

1 limur umboðar Tórshavn – herundir eisini Nólsoy og Sandoy

1 limur umboðar Vágar/Norðstreymoy

1 limur umboðar Suðuroy

Letur samansetingin frammanfyri seg ikki gera, eigur Tænasturáðið at verða sett saman á ein hátt, sum í minsta lagi hevur hesa umboðan:

1 limur umboðar Norðoyggjar/Eysturoy

1 limur umboðar Tórshavn – herundir eisini Nólsoy og Sandoy

1 limur umboðar Vágar/Norðstreymoy/Suðuroy

Ber ikki til at seta Tænasturáðið saman eftir leistunum omanfyri, verður ráðið mannað upp til 5 ráðslimir og 2 varalimir uttan at atlit verður tikið til økini.

Í Tænasturáðnum skulu eisini sita tveir persónar, sum ikki eru, ella hava verið, aktivir alkoholikarar. Hesir verða valdir av Tænasturáðnum og góðkendir av Tænasturástevnuni.

Tænasturáðið skipar seg við formanni, næstformanni, skrivara og kassameistara.

Avgerðir í Tænasturáðnum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum er uppskotið fallið.

Tænasturáðið skal føra fundarbók yvir sítt virksemi. Fundarbókin verður undirskrivað av øllum ráðslimunum.

Tænasturáðið kann seta undirnevndir og arbeiðsbólkar at taka sær av evnum, sum Tænasturáðstevnan hevur tikið avgerð um.

## Valbæri til Tænasturáðið

Í Tænasturáðið kunnu bert veljast persónar, sum hava verið í felagskapinum í minsta lagi í 5 ár, og hava verið edrúir í minsta lagi í 2 ár samanhangandi frammanundan valinum.

Tað áliggur øllum ein skylda at halda hesa reglu og at kunna Tænasturáðið um møgulig brot á hesa reglu.

Ein persónur, sum fellur frá sínum edrússkapi, skal siga starv sítt sum ráðslimur í Tænasturáðnum frá sær. Tá tekur varalimur sæti í Tænasturáðnum.

## Fíggjarviðurskifti

Tænasturáðstevnan, Tænasturáðið og tænastuuppgávur verða fíggjað av AA-bólkunum í Føroyum.

Tænasturáðið skal føra roknskap yvir inntøkur og útreiðslur.

Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember.

Tænasturáðið verður teknað við undirskrift av formanninum saman við einum øðrum ráðslimi.

Roknskapurin skal grannskoðast av tveimun grannskoðarum, sum Tænasturáðstevnan velur. Grannskoðarnir kunnu veljast aftur.

## Endi

Hesar viðtøkur eru samtyktar á Tænasturáðstevnuni tann 17. apríl 2010 og seinast broyttar á Tænasturáðstevnuni tann 20. apríl 2024.

Viðtøkurnar eru seinast góðkendar á Tænasturáðstevnuni, sum varð hildin í Missiónshúsinum í Vestmanna, tann 20. apríl 2024.

# Inngangsorð til AA-fundir

Anonymir Alkoholikarar er felagsskapur av monnum og kvinnum, ið býta royndir, styrki og vón fyri at kunna loysa teirra felags trupulleikar, og harvið hjálpa øðrum at endurreisa heilsuna aftaná misnýtslu av alkoholi.

Tað einasta, ið krevst fyri at gerast limur, er ynski um at gevast við at drekka. Einki limagjald verður goldið og AA fíggjar seg sjálvt við egnum sjálvbodnum gávum.

AA hevur ikki tilknýti til nakra sekt, trúarbólk, trúarrætning, politiskan bólk ella stovn.

AA tekur onga støðu í stríðsspurningum og vil hvørki berjast ímóti ella stuðla nakrari óviðkomandi sak.

Einasta endamál okkara er at halda okkum edrú og hjálpa øðrum at uppnáa edrúskap.

# Tey 12 Stigini

## Fyrsta Stig

Vit játtaðu, at rúsdrekka hevði vald á okkum - at vit høvdu mist tamarhald á lívi okkara.

## Annað Stig

Vit fingu trúgv á, at eitt vald, sterkari enn vit sjálvi, kundi endurreisa okkum til andaliga heilsu.

## Triðja Stig

Vit gjørdu av at geva vilja og lív okkara í umsorgan Guds, soleiðis sum vit skiltu hann.

## Fjórða Stig

Vit kannaðu gjølla og óttaleys okkara egna sinnalag.

## Fimta Stig

Vit játtaðu fyri Gudi, okkum sjálvum og einum øðrum menniskja, júst hvussu brek okkara vóru háttað.

## Sætta Stig

Vit vóru av sonnum til reiðar, at lata Gud loysa okkum úr øllum hesum lyndisbrekum.

## Sjeynda Stig

Í eyðmýkt bóðu vit Hann taka burtur brek okkara.

## Áttanda stig

Vit gjørdu ein lista yvir øll tey fólk, vit høvdu gjørt skaða, og vóru fús at bøta skaðan, um vit við at gera tað ikki særdu tey ella onnur.

## Níggjunda Stig

Vit fóru til hesi fólkini at bøta skaðan, um vit við at gera tað ikki særdu tey ella onnur.

### Tíggjunda Stig
Vit hildu fram við sjálvskanningini, og tá vit høvdu órætt, viðgingu vit tað uttan drál.

### Ellivta Stig
Vit royndu við bøn og djúphugsan at bøta tilvitaða samband okkara við Gud, sum vit skiltu hann, við tað at vit bóðu um bara at kenna vilja hansara við okkum og um styrki til at fremja hann.

### Tólvta Stig
Tá ið vit vóru andliga vakt av at ganga hesi Stigini, royndu vit at bera boðskapin til alkoholikarar, og at íðka hesar grundreglur í øllum virki okkara.

## Teir 12 Siðirnir

### Fyrsti Siður
Okkara felags vælferð eigur at koma fyrst; persónlig heilsubót er treytað av AA-samanhaldi.

### Annar Siður
Viðvíkjandi bólkinum er bara ein endaligur myndugleiki - ein kærleiksfullur Gud, soleiðis sum Hann gevur seg til kennar í samvitsku bólksins. Leiðarar okkara eru bara tænarar, sum nógv verður litið til; teir ráða ikki.

### Triði Siður
Tann einasta treytin fyri at gerast limur í AA er ynskið um at halda uppat við at drekka.

### Fjórði Siður
Hvør bólkur eigur at vera sjálvstøðugur uttan í málum, sum ávirka aðrar bólkar ella AA sum heild.

## Fimti Siður

Hvør bólkur hevur bara eitt høvuðsendamál - at bera boðskap sín til alkoholikaran, sum enn pínist.

## Sætti Siður

AA-bólkurin eigur ongantíð at lata fíggjarligan studning ella læna navnið AA til nakað skylt endamál ella nakra fremmanda fyritøku, so at ikki peningur, ognir og virðing fáa okkum burtur frá sanna endamáli okkara.

## Sjeyndi Siður

Hvør AA-bólkur eigur at vera heilt sjálvbjargin og ikki taka ímóti íkasti uttanífrá.

## Áttundi Siður

AA eigur at verða verandi óyrkislært, men miðstøður okkara kunnu hava serútbúgvið starvsfólk.

## Níggjundi Siður

AA sum slíkt eigur ongantíð at verða skipað; men vit kunnu gera arbeiðsnevndir ella stjórnir, ið hava beinleiðis ábyrgd mótvegis teimum tær arbeiða fyri.

## Tíggjundi Siður

Anonymir Alkoholikarar taka ikki støðu til spurningar uttan fyri Felagsskapin; tí eigur AA-navnið ongantíð at verða drigið inn í alment kjak.

## Elliviti Siður

Upplýsingarpolitikkur okkara er bygdur á atdráttarmegi meira enn á lýsing; vit mugu altíð halda fast um persónligt navnloysi í samband við bløð, útvarp, sjónvarp og film.

## Tólvti Siður

Navnloyna er tað andaliga støðið undir øllum siðum okkara og minnir okkum støðugt á at lata grundreglurnar ganga fram um tað persónliga.

# Tey 12 hugtøkini fyri Tænastu

Tey tólv Stigini hjá AA eru grundreglur fyri persónligum eftirbata. Teir tólv Siðirnir tryggja samanhaldið í felagsskapinum. Tey tólv Hugtøkini fyri Alheims tænastu, sum eru skrivað av einum av stovnarunum av AA, Bill W., í 1962, geva okkum ein samandrátt av skyldum og grundreglum fyri at hjálpa og tryggja, soleiðis at ymisku partarnir í tænastubygnaðinum hjá AA blíva verandi áhugaðir fyri sínum arbeiði og ábyrgdarfullir mótvegis teimum teir tæna.

„Stutta orðalagið" av hugtøkunum niðanfyri vórðu skrivaði til Almennu Tænasturáðstevnuna 1974.

**I.** Endaliga ábyrgdin og hægsti myndugleikin fyri Heimstænastuni hjá AA skal altíð vera felags samvitskan hjá okkara felagsskapi.

**II.** Almenna Tænasturáðstevnan hjá AA er í nærum øllum endamálum vorðin virkandi røddin og samvitskan hjá øllum felagsskapinum í øllum alheims viðurskiftum.

**III.** Fyri at tryggja munadyggari leiðslu mugu vit útbúgva hvørja einstøka eind av AA-ráðstevnuni, Almennu Tænastunevndini og tænastusamskipanini, manning, nevndium og leiðarum – við einum vanabundnum „rætti til avgerðir."

**IV.** Á øllum ábyrgdarstigum eiga vit at halda viðlíka ein vanabundnan „rætt til luttøku", sum gevur einum valdum umboði ábyrgd, sum ein og hvør kann siga frá sær.

**V.** Í allari okkara skipan eigur ein „rættur at heita á" at vera ein meginregla, eisini soleiðis at minnilutameiningar verða hoyrdar, og soleiðis, at persónligar kærur fáa gjølla umhugsan.

**VI.** Ráðstevnan ásannar, at aðalmálið og ábyrgdin í flestu heimstænastumálum eigur at verða útinnt av nevndarlimum í Ráðstevnuni, sum eisini virka í Almennu Tænastunevndini.

**VII.** Sáttmálin og samtyktir hjá Almennu Tænastunevndini eru løglig amboð, sum geva nevndini myndugleika at stjórna og leiða málum hjá alheimstænastuni. Ráðstevnusáttmálin er ikki eitt løgfrøðisligt upprit; tað er bundið av Siðunum og fíggjarmøguleikunum fyri virksemið.

**VIII.** Nevndarlimirnir eru fremstu fyriskiparar av yvirorðnaða politikkinum og fíggjarstýringini. Teir hava umsjónarligt eftirlit av sameindu og virkandi tænastunum hvør sær, og tey fremja hetta við at velja stjórnarar eftir teirra førimuni.

**IX.** Góð tænastuleiðsla á øllum stigum er lívsneyðug fyri okkara framtíðar virkni og trygd. Fremsta heimstænastuleiðslan skal verða hildin av nevndarlimunum, tá hon er útinnt av stovnarunum.

**X.** Øll tænastuábyrgd skal vera í samsvar við ein javnstóran myndugleika, har endamálið við slíkum myndugleika er væl lýst.

**XI.** Stýrini skulu altíð hava bestu nevndarlimiirnar, samstarvstænastustjórar, leiðarar, manning og ráðgevar. Samansetingar, førleikar, innsetingarmannagongdir og rættindi og skyldur eru altíð evni, sum skulu viðgerast við álvarsomum áhuga.

**XII.** Ráðstevnan skal fylgja andanum í Siðunum hjá AA og skal ansa eftir, at hon ongantíð verður sæti fyri hættisligum ríkidømi ella valdi; at virkisgrunnar og tiltaksgrunnar í hóskandi stødd verða skynsomu fíggjarligu grundstuðlarnir; at hon ikki setur nakran av limunum í eina støðu við óskikkaðum myndugleika yvir øðrum; at allar týdningarmiklar avgerðir verða tiknar eftir orðaskifti og atkvøðugreiðslu og – tá tað er møguligt – í fullari semju; at hennara virki ongantíð kann verða persónliga revsað ella orsøk til alment tjak; at hon ongantíð fremur stjórnarligt virkni, og sum felagsskapurin, hon tænir, altíð verður fólkaræðislig í hugsan og virkni.

# Lyftini

Um vit eru samvitskufull við hesum parti av menning okkara, fara vit at verða bilsin, áðrenn vit eru komin hálva leið.

Vit koma at kenna eitt nýtt frælsi og eina nýggja gleði. Vit angra ikki fortíðina, heldur ikki vilja vit klamsa hurðina aftur fyri henni.

Vit hava skilt orðið sálarfrið, og vit fara at kenna frið. Líkamikið hvussu langt niðri á stiganum vit hava verið, fara vit at skilja, hvussu okkara royndir kunnu hjálpa øðrum.

Kenslan av ónýtileika og sjálvmiskunn verða burtur. Okkara lívsháttur og okkara áskoðan til lívið fer at broytast.

Óttin fyri menniskjum og fíggjarligum ótryggleika fara at hvørva. Vit fara at kenna á okkum, hvussu vit skulu viðgera ymsar støður, sum fyrr høvdu forða okkum.

Vit fara knappliga at ásanna, at Gud ger tað fyri okkum, vit ongantíð kundu gjørt sjálvir.

Eru hetta órímilig ynski?

Vit halda ikki. Tey verða uppfylt okkara millum – onkuntíð skjótt, onkuntíð seinni. Tey fara altíð at koma til sjóndar, um vit arbeiða fyri teimum.

# Hvat er ein AA bólkur

Soleiðis, sum langa orðalagið av triðja siði greitt sigur: ,,Okkara limaskapur átti at fevnt um øll, sum líða av alkoholismu. Tessvegna mugu vit ikki avvísa nakran, sum ynskir afturbøtan. Heldur ikki skal AA limaskapur vera bundin av peningi ella føstum reglum. Tveir ella tríggir alkoholikarar, sum samlast um edrúskap, kunnu nevna seg ein AA-bólk, treytað av at teir ikki hava onnur tilknýti."

Eisini finna vit eina frágreiðing um, hvat ein AA-bólkur er, í teimum Tólv Hugtøkunum fyri Alheims tænastu, Tólvta hugtak, sætta trygd.

Eingin revsing kann verða givin fyri gerðir, sum ikki eru í samsvari við AA-grundreglurnar.

Eingi gjøld ella limagjøld kunnu innkrevjast – einans sjálvboðnar peningagávur.

Eingin limur kann burturvísast úr AA. Limaskapur er altíð val hins einstaka.

Hvør AA-bólkur kann vera sjálvstøðugur í øllum málum, sum hann ynskir – tó eigur bólkurin ikki at fremja avgerðir, sum kunnu skaða AA um heild.

Ein og hvør bólkur av alkoholikarum, sum eru savnaðir fyri at uppnáa edrúskap, kann nevna seg ein AA-bólk, treytað av at bólkurin ikki hevur nakað annað endamál ella annað tilknýti.

Nakrir AA-limir hittast í serligum AA-bólkum – fyri menn, fyri kvinnur, fyri ung, fyri læknar, fyri samkynd ella onnur. Um allir limirnir eru alkoholikarar og fundirnir eru opnir fyri øllum alkoholikarum, sum søkja sær hjálp til edrúskap, uttan mun til starv, kyn ella onnur eyðkenni, og hesi annars lúka vanligar treytir, sum áseta hvat ein AA-bólkur er, kunnu hesi nevna seg ein AA-bólk.

UNITY
AA
SERVICE
RECOVERY